

# Stril Krúnborg komið til Noregs

**Jan Müller**

09.01.2014 - 10:45

Oljan.fo

Neyvan taka vit munnin ov fullan, um vit staðfesta, at fá tíðindi eru so kærkomin í Føroyum, sum tá eitt av okkara skipum er komið trygt í havn. Hetta kann av sonnum eisini  sigast um nýggja frálandaskipið hjá reiðaríinum Krúnborg Offshore, Stril Krúnborg, sum júst er vorðið sleipað trygt úr Pólandi til Noregs at verða gjørt liðugt.

Hóast enn ikki er klárt til at fara í vinnu, so verður nú arbeitt við at fáa skipið liðugt til at kunna arbeiða í altjóða oljuvinnuni – og hvør veit – ein dag kanska eisini í eini føroyskari oljuvinnu, har tað so avgjørt fer at verða brúk fyri skipum av Stril Krúnborg slagnum at fáa útbúnað og útgerð til framleiðslu uppá pláss á landgrunninum.

Skrokkurin, ið er bygdur í Pólandi, varð sleipaður til Noregs eftir nýggjár og liggur nú tryggur við bryggju á skipasmiðjuøkinum í Flekkefjord. Har verður skipið nú gjørt liðugt at lata eigarunum, sum eru norska reiðaríið Simon Møkster Shipping og føroyska Krúnborg Offshore, í juni mánað.

   